# Fundarskipan fyri Tórshavnar býráð

## FUNDIR BÝRÁÐSINS

### § 1

**<u>1. petti</u>.** Fundir býráðsins eru almennir. Býráðið kann tó gera av, at ávís mál verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum.

**<u>2. petti</u>.** Uttan so at býráðið í serstøkum føri tekur aðra avgerð, skulu niðanfyri tilskilaðu mál verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum:

1. Mál, har mett skal verða um persónlig viðurskifti.
2. Mál um keyp og sølu av føstum ognum og veðseting.
3. Kostnaðarætlanir og tilboð viðvíkjandi byggiarbeiðum og tilfarsveitingum.

**<u>3. petti</u>.** Mál verður viðgjørt fyri afturlatnum hurðum, um borgarstjórin ger tað av, ella um 1/3 av limunum krevur tað.

**<u>4. petti</u>.** Mál, ið skulu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum, skulu helst avgreiðast fyrst.

### § 2

Øll hava atgongd til almennu fundir býráðsins. Órógvar áhoyrari, ella sýnir hann ikki sømiligan atburð, kann borgarstjórin vísa honum ella um neyðugt øllum áhoyrarum út úr býráðssalinum. Borgarstjórin kann bíleggja sessir til umboð fyri fjølmiðlunum.

### § 3

Býráðslimir hava skyldu at møta á býráðsfundum. Ber ikki til hjá býráðslimi at koma á fund, boðar hann borgarstjóranum frá, áðrenn fundurin byrjar. Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.

Noyðist býráðslimur at fara av fundi, skal hann boða borgarstjóranum frá, og verður følt í gerðabókina, nær limur fer.

## FUNDARSKRÁ

### § 4

**<u>1. petti</u>.** Borgarstjórin skipar fyri, at fundarskrá verður send hvørjum býráðslimi í seinasta lagi 4 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða.

**<u>2. petti</u>.** Um limur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir borgarstjórin hetta mál á skránna.

### § 5

**<u>1. petti</u>.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, styðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á býráðsskrivstovuni minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.

**<u>2. petti</u>.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.

Ikki er loyvt at taka ljóstøk av trúnaðartilfari, sum er til taks á býráðsskrivstovuni sum partur av máli ella í øðrum sambandi.

**<u>3. petti</u>.** Samstundis, sum boðað verður til eykabýráðsfundir, letur borgarstjórin í so stóran mun sum gjørligt býráðslimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.

## VIÐTØKUFØRI

### § 6

**<u>1. petti</u>.** Býráðið er viðtøkuført, tá ið í minsta lagi helvtin av býráðslimunum eru á fundi.

## FUNDARLEIÐSLA

### § 7

**<u>1. petti</u>.** Borgarstjórin, og um honum berst frá, varaborgarstjórin leiðir býráðsfundirnar og ansar eftir, at teir fara sømiliga fram. Hann ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.

**<u>2. petti</u>.** Borgarstjórin spyr, áðrenn orðaskiftið byrjar, um nevndarformaður/frásøgumaður biður um orðið og gevur annars býráðslimunum orðið í teirri raðfylgju, teir hava biðið um. Um fleiri biðja um orðið í senn, avger borgarstjórin raðfylgjuna.

**<u>3. petti</u>.** Býráðslimur skal, tá til ber, reisa seg, meðan hann talar og venda røðu sína til borgarstjóran. Verður býráðslimur nevndur í røðu, skal hann altíð nevnast við fornavni og eftirnavni. Býráðslimur skal ikki verða órógvaður í talu síni, tó kann borgarstjórin tala at ella taka orðið frá honum.

**4. petti.** Endurgeving kann bara verða nýtt avmarkað og við borgarstjórans loyvi. Tilskilast skal, hvaðan endurgevingin er, og hvar hon stendur.

**5. petti.** Til framløgu og umrøðu av málum eru tær talutíðir galdandi, sum standa í 6. og 7. petti.

**6. petti.** Nevndarformaður leggur málið fram í 5 minuttir.

**7. petti.** Undir orðaskiftinum fær býráðslimur/framsøgumaður orðið tvær ferðir í einum máli, fyrru ferð 5 minuttir, aðru ferð 3 minuttir. Býráðslimur kann fáa orðið í 1 minutt at seta fram viðmerking/rættleiðing, eftir at býráðslimur hevur havt orðið. Síðstnevndi býráðslimur fær orðið til at svara viðmerkingum aftur, men má tað ikki vera longur enn 2 minuttir. Borgarstjórin kann loyva frávik í talutíðunum, tá ið vavið av einum máli ger tað neyðugt, og eisini geva býráðslimi orðið til viðmerking at svara aftur.

**8. petti.** Talar býráðslimur longur, enn loyvt er, tekur borgarstjórin orðið frá honum, tá ið hann eina ferð hevur mint hann á, at talutíðin er liðug.

**9. petti.** Hvør býráðslimur eigur at lýða avgerðir borgarstjórans, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er ein býráðslimur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann býráðið eftir uppskoti frá borgarstjóranum nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.

**10. petti.** Um so er, at býráðslimur ikki ger eftir boðum borgarstjórans, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann borgarstjórin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.

**11. petti.** Øll uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða stílað til borgarstjóran.

**12. petti.** Borgarstjórin kann lata býráðið avgera mál, ið hann sjálvur hevur rætt at taka endaliga støðu til.

## FRAMLØGA AV MÁLUM

### § 8

**1. petti.** Borgarstjórin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni. Kortini ger býráðið av, í hvørji raðfylgju málini skulu verða viðgjørd, tá ið minst 3 býráðslimir krevja atkvøðugreiðslu hesum viðvíkjandi.

**2. petti.** Tá ið fundur byrjar, kann býráðslimur biðja um orðið um fundarskránna og seta fram uppskot, um mál á fundarskránni skulu viðgerast á almennum fundi ella fyri læstum hurðum.

### § 9

**1. petti.** Eitt mál verður bert viðgjørt eina ferð, uttan so at annað er ásett í lóggávuni, ella býráðið samtykkir, at málið skal verða viðgjørt 2 ferðir. Ársfíggjarætlan kommununnar, eykajáttan og broyting í kommunustýrisskipanini skal tó verða viðgjørd á 2 fundum.

**2. petti.** Um mál fær tvær viðgerðir verður við 1. viðgerð bert atkvøtt, um málið skal fara til 2. viðgerð.

Býráðslimur hevur rætt til at siga sína hugsan um eitt mál, áðrenn býráðið tekur avgerð um, at tað skal fara til 2. viðgerð. Millum 1. og 2. viðgerð skulu ganga í minsta lagi 24 tímar.

Millum 1. og 2. viðgerð av ársfíggjarætlanini, eykajáttan og broyting í kommunustýrisskipanini skulu tó ganga í minsta lagi 14 dagar.

**3. petti.** Tá ið eitt mál verður viðgjørt tvær ferðir, skulu skjølini, ið hoyra til málið - aftaná 1. viðgerð - um tað er møguligt, verða løgd til eftirlit fyri limirnar.

**NEVNDARVIÐGERÐ**

**§ 10**

**1. petti.** Heldur býráðið, at eitt mál eigur at verða kannað av serstakari nevnd, áðrenn býráðið tekur endaliga avgerð, verður slík nevnd vald við so mongum limum, sum býráðið heldur hóska í hvørjum einstøkum føri.

**2. petti.** Nevndin, ið sjálv skipar seg við formanni, skal handa borgarstjóranum skrivað álit, og ger hesin býráðslimirnar kunnugar við álitið samsvarandi reglunum í § 4.

**3. petti.** Býráðið kann gera av at senda eitt mál, ið ikki hoyrir undir málsøkið hjá ávísari nevnd, til viðgerðar í eini av teim føstu nevndunum.

**GEGNI**

**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum býráðslimi, skal hann siga býráðnum frá hesum. Eisini kann ein býráðslimur reisa spurningin um gegni hjá øðrum býráðslimi.

**2. petti.** Býráðið ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum býráðslimi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at býráðið ger av, at býráðslimur er ógegnigur, skal limur fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Býráðslimur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið.

**3. petti.** Er líkt til, at býráðið tekur avgerð um, at býráðslimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimurin fær fundarboð.

**4. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, býráðið ger av, at býráðslimur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 2/3 av teimum møttu býráðslimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

**ATKVØÐUGREISLA**
**broytingar- og eykabroytingaruppskot**

**§ 12**

Býráðslimir kunnu bert taka lut í atkvøðugreiðslum býráðsins, um teir persónliga eru til staðar, meðan hesar fara fram.

**§ 13**

**1. petti.** Atkvøðugreiðsla fer fram á tann hátt, at býráðslimirnir reisa seg úr sæti, tá til ber. Er atkvøðugreiðslan eftir borgarstjórans tykki ógreið, letur hann býráðslimir atkvøða av nýggjum. Borgarstjórin ella í minsta lagi 3 býráðslimir kunnu undan atkvøðugreiðsluni krevja, at atkvøtt verður við navnakalli.

**2. petti.** Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta, um ikki annað er fyriskipað í lóggávuni. Eitt uppskot er samtykt, tá meirilutin av teimum, sum greiða atkvøðu, atkvøður fyri. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er uppskotið felt

**3. petti.** Heldur borgarstjórin, at allir býráðslimir eru samdir, kann hann gera býráðnum kunnugt, at málið er samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Mælir býráðslimur tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.

**4. petti**. Býráðslimur kann ikki sleppa sær undan ábyrgd við ikki at greiða atkvøðu.

**5. petti.** Avgerð, sum býráðið hevur tikið, kann ikki á sama fundi verða broytt, uttan so at allir býráðslimir, ið vóru á fundi, tá avgerðin varð tikin, eru samdir um hetta.

**§ 14**

**1. petti**. Broytingar og broytingar til broytingaruppskot kunnu verða framløgd, um atkvøðugreiðsla ikki er byrjað. Ikki er neyðugt at seta fram ella taka fyrivarni viðvíkjandi slíkum uppskotum undir 1. viðgerð av einum máli, sum skal verða viðgjørt 2 ferðir, sbr. tó 5. petti.

**2. petti.** Borgarstjórin setir fyrst undir atkvøðugreiðslu broytingaruppskotini til upprunauppskotið hvørt eftir annað. At enda verður atkvøtt um upprunauppskotið við teim samtyktu broytingunum. Fellur tað, eru eisini broytingaruppskotini fallin burtur. Borgarstjórin ræður fyri, hvussu atkvøtt verður.

**3. petti.** Í málum, sum skulu verða viðgjørd 2 ferðir, kann býráðið gera av at seta eina tíðarfreist fyri broytingaruppskotum og eftir umstøðunum eisini eykabroytingaruppskotum. Um so er, kunnu slík ikki verða sett fram, aftan á at freistin er farin, uttan so at býráðið við atkvøðumeiriluta gevur sítt samtykki hesum viðvíkjandi.

**4. petti.** Um býráðslimir ikki eru kunnaðir um broytingar- og eykabroytingaruppskot, áðrenn tey koma til 2. viðgerð, greiðir borgarstjórin frá uppskotinum beinanvegin, orðaskiftið byrjar, sí 14,1.

**5. petti.** Áðrenn atkvøðugreiðsla í einum máli er byrjað, kunnu uppskot um val av nevnd og um at senda eitt mál til eina fyrr valda nevnd ella til víðari viðgerð í eini nevnd verða framløgd. Verður slíkt uppskot lagt fram, aftaná at orðaskiftið í málinum er byrjað, verður tað slitið, og ger býráðið av, um málið skal fara til nevndarviðgerð.

## MEIRILUTAVAL

### § 15

**1. petti.** Tá ið býráðið skal velja 1 umboð ella 1 lim í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir meirilutavalháttinum.

**2. petti.** Við meirilutavali verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum, er valt. Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um. Fær hvørgin teirra meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti.

## LUTFALSVAL

### § 16

**1. petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.

**2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

**3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.

**4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.

**5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.

**6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3.

## STARVSSETAN

### § 17

Tá ið býráðið setir persón í kommunalt starv, og fleiri umsøkjarar eru at velja millum, fer val millum umsøkjarar fram eftir reglunum í § 15.

## GERÐABÓKIN (O.A.)

**§ 18**

**1. petti.** Avgerðir býráðsins verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av kommunustjóranum ella fundarskrivaranum. Borgarstjórin sigur, hvat skrivast skal.

**2. petti.** Býráðslimur kann krevja sína serstøðu í stuttum skrivaða í gerðabókina. Snýr tað seg um mál, ið skulu sendast til annan myndugleika, kann hann eisini krevja, at myndugleikin verður kunnaður um, hvat skrivað er í gerðabókina. Ynskir avvarðandi býráðslimur við málinum at senda skriv, sum gjøllari lýsir hansara støðu, eigur hann at siga hetta við borgarstjóran, sum so setir eina tíðarfreist fyri, nær skrivið skal avhendast.

**3. petti.** Í gerðabókini verður nágreiniliga endurgivið, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram, og hvørjir limir ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.

**4. petti.** Tá ið ein fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av býráðslimunum, sum hava verið á fundinum. Býráðslimirnir kunnu ikki við at vísa til atkvøðugreiðslu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.

## VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN

**§ 19**

Býráðslimirnir hava skyldu til fyribils at halda seg til avgerð borgarstjórans viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri býráðið á næsta fundi.

## BROYTINGAR Í FUNDARSKIPANINI

**§ 20**

Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin.

Broytingar og uppískoyti til fundarskipanina skulu verða viðgjørd á tveimum regluligum býráðsfundum.

*Framløgd á býráðsfundum 22. februar og 29. mars 2001*
*og góðkend 26. apríl 2001*

*Jan Christiansen*
*borgarstjóri*

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Fundir býráðsins | § 1-3 |
| Fundarskrá | § 4-5 |
| Viðtøkuføri | § 6 |
| Fundarleiðsla | § 7 |
| Framløga av málum | § 8-9 |
| Nevndarviðgerð | § 10 |
| Gegni | § 11 |
| Atkvøðugreiðsla | § 12-14 |
| Meirilutaval | § 15 |
| Lutfalsval | § 16 |
| Starvssetan | § 17 |
| Gerðabókin | § 18 |
| Fundarskipan……. | § 19 |
| Broytingar í fundarskipanini | § 20 |